# Ikki vi› fyri at læra

*Venjarin hjá kvinnulandsli›num, Sophus Dal-Christiansen, er ikki samdur vi› teimum, sum halda, at vit bara eru vi› í altjó›a kappingum fyri at læra. Hann heldur ikki, at penga-hondbóltur hevur eina framtí› í Føroyum, og hann heldur ta› vera ørvitisfiskar, sum ætla at byggja høll í Hoyvík ísta›in fyri at útbyggja Gundadalshøllina*



STEFAN Í SKORINI

31 ára gamli havnarma›urin Sophus Dal-Christiansen hevur lagt hondbóltsskógvarnar og harpiksi› á hillina fyri nøkrum árum sí›ani. Nú hevur hann valt at halga seg venjarastarvinum. Hann hevur havt 1. kvinnu- og mansli› hjá Kyndli undir sær seinnu árini, men nú hevur hann tiki› eitt stig uppeftir stiganum og skal standa á odda fyri kvinnulandsli›num, tá ta› skal taka síni fyrstu fet í altjó›a undankapping.

Annars hevur Sophus veri› virkin innan hondbólt, sí›an hann sjey ára gamal í 1976 fyrstu fer› vandi vi› Kyndli.

## Royndir venjarar altavgerandi

Sophus hevur sostatt eisini roynt seg í yngru deildunum hjá Kyndli, og hann heldur, at venjingarhættirnir og ikki minst venjararnir eru munandi betra›ir, sí›an hann spældi.

– Vit høvdu ofta bara onkran tilvildarligan venjara, sum tók sær av yngru deildunum. Ta› var ikki fyrr enn eg kom í vaksnamannadeildirnar; at venjingin var› meira skipa› vi› royndum og dugnaligum venjarum. Eg síggi nú, at alt fleiri feløg velja at seta ungdómsvenjarar, sum hava skil og førleika at geva teimum ungu spælarunum holla vegle›ing, so teir kunnu mennast á bestan hátt, so felagi› fær sum mest burturúr seinni.

– Ta› sæst eisini aftur á fleiri av teimum árgangunum, sum koma upp í vaksnamannahondbóltin nú, at teir eru ógvuliga væl fyri, tí venjingin hevur veri› á einum høgum stø›i vi› gó›um venjarum. Ta› er alfa og omega, at ta› royndir venjarar vi› tí røttu útbúgvingini hava teir yngru leikararnar undir hond, sigur Sophus.

– At ta› eru ungdómsvenjarar og -lei›arar, sum eru vi› til at skipa virksemi, og ta› er ein fortreyt, at venjingin hjá teimum smærru er skipa›, fyri at hondbólturin skal yvirliva og mennast í framtí›ini. Í nógvum feløgum er ta› ov langt millum talentini, og hjá einum lítlum felagi kunnu ta› ofta ganga fleiri ár ímillum, at ein gó›ur og ungur spælari kemur fram. Ta› er umrá›andi, at ta› meira javnan spretta ungir spælarar fram í bestu vaksnamannadeildunum. Hetta fæst bara vi› at hava skipa› vi›urskifti og skikka›ar venjarar í feløgunum.

*»Ta› er tíverri bara ein vinnari í hasum spælinum, og ta› er spælarin sjálvur, sum kanska kann vinna sær nøkur fá oyru«*

*Um gongdina vi› at alt meira peningurin kemur upp í hondbóltin*

– Kappingin um tey yngru er eisini hør› millum tær ymsu ítróttargreinarnar, og foreldrini eru tí›liga varug vi›, hvar venjingin er tann besta, og um a›rar ítróttargreinar eru betur fyri enn hondbólturin, ver›a nógv talent mist fyri bor›. Tann, sum ikki hevur skipa› vi›urskifti, dettur ni›ur ímillum.

## Óheppi› vi› pengahondbólti

Seinastu fáu árini hevur sama gongd veri› at sæ› innan hondbólt sum fótbólt, har spælarar skifta feløg fyri pening. Spælararnir ver›a nú meira ella minni løntir fyri strí›i›, i› teir gera á leikvallunum. Ta› er líkt til, at hondbólturin fylgir í fótasporunum hjá fótbóltsfeløgunum.

– Ta› er ein óheppin gongd, at feløg eru farin at kappast um spælarar sínamillum. Ta› er tíverri bara ein vinnari í hasum spælinum, og ta› er spælarin sjálvur, sum kanska kann vinna sær nøkur fá oyru. Tey feløgini, sum hava fíggjarliga orku, kunnu kappast um spælarar og taka frá teimum minni gó›u feløgunum, og ta› fer ikki at ganga í longdini.

– Í míni ver› er ta› so einfalt, at ta› er ikki grundarlag fyri veruligum pengahondbólti í Føroyum. Fíggjarliga orkan er ikki til sta›ar hjá feløgunum. Um vit hyggja at Neistanum, so leg›i felagi› nógvan pening í at fáa n‡ggjar spælarar til felagi›, og hvar eru teir í dag? Teir vunnu so eitt meistaraheiti›, men hvussu ver›a ungdómsdeildirnar ra›festar í einum slíkum felag. Um fyribrigdi› gerst vanligari, kann ta› henda, at peningur ver›ur brúktur til at styrkja um 1. li›i› heldur enn at seta peningin í ungdómsarbei›i›. So er ta› hondbólturin, sum ver›ur stóri taparin. Eg ivist tó ikki í, at ta› fer at regulera seg sjálvt, tí inntøkumøguleikarnir eru ikki teir somu sum í fótbóltinum.

Nú stendur hondbóltskappingin fyri dur›um, og í oktober ver›a fystu dystirnir spældir. Í fjør upplivdu vit sera spennandi kappingar hjá bæ›i monnum og kvinnum. Hjá monnum var› einki avgjørt fyrr enn á seinasta leikdegi, me›an kvinnurnar hjá Neistanum nú av álvara eru koppa›ar av trónuni sum besta kvinnuli› í landinum ár. Sophus heldur tó, at li›ini eru tó komin naka› seint í gongd hetta kappingarári›.

– Mín fatan er, at øll li›ini eru komin alt ov seint í gongd vi› venjingini. Um vit skulu gera okkum galdandi í altjó›a hondbólti, sum hondbóltssambandi› nú hevur ætlanir um, er ney›ugt, at spælararnir eru í gongd ein størri part av árinum enn nú. Kappingin er frá oktober til máná›arskifti› mars-apríl, og tí›arskei›i› um summari› liggur hondbólturin stillur, og spælararnir gera næstan einki vi› venjingina ta tí›ina. Hetta tí›arskei›i› hev›i veri› ynskiligt, at feløgini og spælararnir gjørdu naka› meira vi› styrkivenjing ella vandu eitt sindur av hondbólti, tí ta› nyttar ikki at byrja umaftur á hvørjum ári. Ta› er tó uppgávan hjá feløgunum og spælarunum at halda seg í gongd, me›an hondbóltskappingin liggur still.

*»Politikararnir hugsa seg ikki serliga væl um, tá ein høll ver›ur bygd í Hoyvík, tá ein útbygging av Gundadalshøllini hev›i veri› ein nógv bíligari loysn á málinum«*

*Um ætlanina at byggja ítróttahøll í Hoyvík*

## Høllin í Hoyvík er ørvitisætlan

Sophus er gla›ur um, at b‡rá›i› hevur samtykt at fara undir at byggja eina n‡ggja ítróttarhøll í Hoyvík, men ta› er tó ikki bara rós, Sophus hevur at bera politikarunum í Havn, sum hava fingi› uppskoti› ígjøgnum.

– At ein n‡ggj høll ver›ur bygd í Hoyvík er avgjørt gott, og stórur tørvur er eisini á eini slíkari høll, men avger›in er ikki serliga væl umhugsa›. Politikararnir hugsa seg ikki serliga væl um, tá ein høll ver›ur bygd í Hoyvík, tá ein útbygging av Gundadalshøllini hev›i veri› ein nógv bíligari loysn á málinum og milliónir av krónum kundu veri› spardar av teimum tjúgu, sum nú eru settar í ætlanina grei›ir Sophus frá.

– Tá Gundadalur frammanundan er ein ítróttarmi›depil, hev›i ta› veri› betri og bíligari at bygt uppí í Gundadali, so at tveir hondbóltsvallir vóru í høllini. Tá tosi eg eisini sum skattaborgari í Havnini, tí bíligara loysnin er eisini tann betra. Um høllin í Gundadali var› útbygd, hev›i eisini veri› møguleiki fyri ø›rum tiltøkum har, ísta›in fyri at gera eina venjingarhøll í Hoyvík, sum mest er til Hoyvíkingar. Har haldi eg, at politikararnir mest hugsa um at dyrgja eftir atkvø›um, nú b‡rá›sval stendur fyri framman.



– B‡rá›i› hevur ikki skilt, hvat ta› kostar at reka eitt felag, tí størsti trupulleikin er, at feløgini knógva undir eini tungari hallarleigu. B‡rá›i› vir›ir harvi› ikki ta› arbei›i›, sum hondbóltsfeløgini royna at gera. Ta› hev›i veri› ynskiligt, at hondbólturin fekk somu umstø›ur, sum fótbólturin hevur.

Sophus fegnast tó um, at ein høll afturat ver›ur til taks hjá feløgunum, so fleiri venjingartímar kunnu koma á skránna, tí vi›urskiftini eru út av lagi sum nú er. Tey tr‡ hondbóltsfeløgini hava í løtuni tvær hallir at venja í, men ta› hevur í fleiri ár veri› í minna lagi. Tær yngru deildirnar ver›a í dag ra›festar aftarlaga, tí ov fáir venjingartímar eru til taks.

– Nógv av ungdómsli›unum venja einar tvær fer›ir um vikuna, og venjarin hevur eini 40 børn inni í einari høll. Børnini fáa tá einki burturúr, og hava ongan møguleika veruliga at spæla hondbólt. Nú ver›ur ein høll bygd afturat í Hoyvík, og ta› er avgjørt gott, tí stórur tørvur er á eini slíkari. Serliga tær yngru deildirnar mugu hava fleiri venjingartímar, og vónandi sleppa tey uppí part har uppi. Høllin á Hálsi ver›u nú n‡tt til alt møguligt anna› enn hondbólt, konsertir o.t. og kanska kundi høllin Hoyvík loyst trupulleikarnar, sigur Sophus.

*»At vera vi› bara fyri at læra er ikki nøktandi. Eg haldi, at vit skulu seta landsli›unum krøv, men sjálvandi vera realistisk samstundis«*

*Um n‡ggja landsli›stí›arskei›i› hjá hondbóltinum*

## Krøv skulu setast landsli›num

Bæ›i kvinnu- og manslandsli›i› hava sera torførar uppgávur fyri framman. Menninir skulu spæla tríggjar dystir í EM-undankapping, me›an kvinnurnar møta Svøríki í einum HM-dysti, sum skal avgera, hvør skal sleppa í undanbólkin. Hetta er fyrstu fer› í nógv Harrans ár, at føroysk hondbóltslandsli› spæla undankappingardystir.

Sophus hevur sjálvur spælt á føroyska landsli›num, men arbei›i› var ikki serliga mi›víst tey árini, hann spældi. Nakrir hissini dystir móti íslendingum er ta› heila. Hetta eru tó spennandi ítróttarligar uppgávur, sum standa fyri framman, og hondbóltssambandi› hevur fyrireika› seg væl gjøgnum fleiri ár.

– HSF gjørdi ta› skilagó›a, at teir fóru í gongd vi› ungdómslandsli›unum, tá landsli›sarbei›i› byrja›i aftur. Teir spælararnir, sum nú koma á landsli›i› hava tískil roynt at spælt altjó›a dystir vi› ungdómslandsli›unum fyrr, og hetta ger teir betri førar fyri at taka avbjó›ingarnar upp. Hetta var kanska ein avger›, i› ikki var› væl dámd hjá summum, men ta› var ein røtt avger›, sum var› tikin tá.

– Nú fáa vit at síggja, hvussu ta› ver›ur vi› hesum uppgávunum, men hetta er bara eitt startskot. Ta› nyttar tó einki, um vit eftir dystirnar bara seta okkum afturá og siga, at vit eru ikki nóg gó›.

– At vera vi› bara fyri at læra er ikki nøktandi. Eg haldi, at vit skulu seta landsli›unum krøv, men sjálvandi vera realistisk samstundis. So kunnu vit spyrja, hvussu langt ber til at koma, og á hvørjum øki kunnu vit betra okkum.

– Fótbóltslandsli›i› var vi› fyri at læra naka› leingi. Nú ver›a krøv sett spælarunum, og teir hava eisini nøkur frálík úrslit at vísa á.

Mótstø›uli›i› hjá Sophusi og kvinnunum ver›ur Svøríki. Sophus hevur sæ› svenska landsli›i› spælt ímóti Danmark og Fraklandi, sum bæ›i eru vi› í OL. Svenska li›i› tapti, men ta› var ikki fyrr enn í seinna hálvleiki, at hini li›ini drógu frá. Hetta bendir á eina ógvuliga torføra uppgávu hjá kvinnunum.

## Heldur fram innan hondbólt

Sophus hevur veri› virkin innan hondbólt leingi, og hann hevur ongar ætlanir um at gevast í næstu framtí›.

– Ta› er ógvuliga nattúrligt hjá mær at halda fram sum venjari, tí mær dámar ta› væl og síggi nakrar avbjó›ingar í tí. Eg havi nøkur spennandi hugskot, sum eg ætli mær at arbei›a ví›ari vi›, sigur Sophus at enda.







